# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Optikbúðin í nýggjum handilshølum

Leygardagin 19. november letur Optikbúðin í Havn upp í nýggjum bygningi í Bøgøtu 5.

Optikbúðin lat fyrstu ferð upp í Bøgøtu 2 í 1988, seinni varð flutt í Bøgøtu 4, og nú letur handilin so upp í nýggjum bygningi í Bøgøtu 5.

Húsini eru í tveimum hæddum, her hvør hæddin er umleið 90 fermetrar + loftið, ið er 60 fermetrar, tey skulu nýtast sum bæði handil og bústaður. Húsini eru bygd á økið, har bakaríið í Horni var fyri nógvum árum síðum.

Tað eru Una og Poul Einar Kruse, sum eiga og reka Optikbúðina. Móttøka verður í handlinum leygardagin frá kl. 12-15.



*Starvsfólkini í Optikbúðini, f.v.: Annika Hjaltalin, Rósmari Hellisdal, og Una og Poul Einar Kruse. Elvira Thomsen vantar á myndini*

# Polskur patologur uppá pláss

**Fyrr í mánaðinum byrjaði polendinurin, Maciej Jan Kaminski í starvinum sum patologur á Landssjúkrahúsinum. Hann hevur áður starvast sum slíkur í Polen, men er nú farin til verka í Føroyum**

PATOLOGI
*Snorri Brend*



*Maciej Jan Kaminski er til arbeiðis á patologisku deildini. Hann skal byggja upp ta tænastuna, sum deildin ikki hevur gjørt í eina tíð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ein av uppgávum hansara verður at byggja upp ta tænastuna, sum tann patologiska deildin ikki hevur kunnað gjørt til fulnar í eina tíð.

Neyðugt hevur tí verið at sent allar royndirnar av landinum, til Rigshospitalet í Danmark. Men hetta verður ikki neyðugt so leingi aftrat, nú hesin patologurin er farin til verka.

Landssjúkrahúsið hevur havt – og hevur framvegis – eina avtalu við Rigshospitalet um hesar kanningarnar. Henda avtalan verður galdandi í eina tíð aftrat, meðan tann føroyska deildin so líðandi fer at taka yvir hetta arbeiðið.

Endamálið er eisini at stytta um svartíðina uppá royndirnar, sum higartil hava verið sendar til Danmarkar, upplýsir Tummas í Garði, læknastjóri.

Samstundis verða møguleikar skaptir fyri at gera tað fakliga umhvørvið á Landssjúkrahúsinum betri, eins og gjørligt verður at taka uppaftur arbeiðið at gera obduktiónir.

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli:

# Næmingar við søluframsyning í Smiðjuni

**Týsdagin 15. nov. læt listaframsýningin "Spírandi list" upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru næmingar í Tórshavnar Kvøld– og Ungdómsskúla, ið hava hesa søluframsýningina**

FRAMSÝNING
*Lena R. Guttesen*
*Barbara Tausen*



Fyri sættu ferð hava næmingarnir í Kvøld– og Ungdómsskúlanum eina felags framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Talan er um næmingarnar hjá Randi M. Gunnarsdóttir, sum hava hesa søluframsýningina. Hetta er ein spennandi framsýning við mongum ymiskum evnum. Randi er annars úr Havn, og uttanum listaheimin starvast hon sum stuðulspedagogur.

Tey, sum eru við á framsýningini eru: Marita Christoffersen, Anna Maria Nyby, Louisa Fjalsbak, Vera Bjørgvin, Ólavur Thomsen, Anna Hansdóttir, Ada í Líð, Per Poulsen, Kristin Thomsen, Poul Justinussen, Jacobina Hansen, Anna Maria Frederiksen, Marita Eriksen, Ingrid Gregersen, Eigil Lyngsø, øll úr Havn, Sigvard Steffensen, Bergfríð Augustinussen, Rúna Olsen, Arnbjørn Christiansen úr Kollafirði, og Eydna Lucia Abrahamsen og Soffía Við Stein úr Fuglafirði.

Framsýningin er opin til og við 23. november, allar dagar frá 14-18.

Klaksvíkar kommuna:

# Framsýning um Blithsome og Coraliu

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við at tað eru liðin 70 ár síðan Coralia bjargaði manningini á Blithesome, hevur Klaksvíkar býráð sett sær fyri at gera eitt tiltak til at minnast hesa hending.

Býráðið hevur keypt modellini av bæði Blithsome og Coraliu og hevur heitt á Óla Olsen, sjómansskúlalærara, um at skipa eina framsýning og annars greiða frá um hendingina.

Dávur Davidsen úr Tjørnuvík verður eisini við, og fer hann at avdúka modellini av Coraliu og Blithesome. Sangbólkurin Vitin syngur.

Eftir tiltakið verður boðið kaffi í býráðshøllini. Síðani verður bókin hjá Dáva Davidsen: Dávur í Tjørnuvík, seld í kunningarstovuni; og ber til at fáa bókina signeraða av Dáva, sum er 94 ára gamal – Hann er einasti eftir á lívi, sum var við til tiltiknu bjargingina.

Tiltakið er alment og verður í Býráðshøllini leygardagin 19. november kl. 15.00, har øll eru vælkomin.




## Tøkk

Eg vil á henda hátt hjartaliga takka øllum tykkum mongu, sum mintust meg á 30 ára starvsdegnum.
Ein serlig tøkk til Stranda Missiónshús.
Gud signi tykkum øll.

Kærar heilsanir
**Niels Jacob Nielsen, trúboðari**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri samkenslu og stóra hjálp, tá ið elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Hemming Petersen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, sum komu inn á gólvið og tykkum, sum á ein hvønn hátt hjálptu við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Hjartans tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Sára, John, Birgir, Àsmund og Elsa**